# Tobbi og Jenis renna undan hinum

**Torbjørn Jacobsen og Jenis av Rana duga væl at koma fram í fjølmiðlunum, og samskiftisráðgevi heldur, at teir duga nógvar snildir betur enn aðrir politikarar**

MIÐLAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað fór ikki stillisliga aftur við borðinum, at nógv umtalaði løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen skuldi verða gestur á Bønarlinjuni hjá Lindini hóskvøldið í farnu viku. Jenis av Rana er vertur í sendingini, og hann hevði fingið starvsfelagan úr løgtinginum í studio til eitt heldur óvanligt prát teirra millum.

Á Skálafjørðinum hevði ein heimahjálp úr at gera við at fresa runt og stilla útvarpstólini hjá teimum gomu á Lindina, og sjálvt í Brússel, har nógvir føroyingar vóru á messu, var Tobbi stóra samtaluevnið.

Soleiðis settu Tobbi og Jenis dagsordan, og tað hava teir mangan gjørt fyrr.

Meðan útlendskir politikarar sum Bush, Blair og Fogh hava eitt vælvirkandi miðlaapparat at dúva á fyri at standa seg væl í miðlunum, hava føroyskir politikarar als ikki hetta í sama mun, og tí er tað nógv upp til hvønn einstakan politikara at duga at snúgva sær og vísa tað tev, sum skal til fyri at koma fram at í fjølmiðlunum.



*Torbjørn Jacobsen og Jenis av Rana vaktu enn einaferð ans, tá ið teir hóskvøldið høvdu eina drúgva samtalu á Bønarlinjuni hjá Lindini. Samskiftisráðgevi heldur, at teir duga væl at finna rúm í fjølmiðlunum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Í hesum spæli standa Torbjørn Jacobsen og Jenis av Rana seg betur enn teir flestu føroysku politikararnar.

– Vit mugu nokk ásanna, at Jenis á Rana og Torbjørn Jacobsen eru tveir politikarar, ið hava dugað væl at sett dagsskránna á hvør sínum øki. Orsøkin er uttan iva, at báðir hava dugað væl at fingið rúm í fjølmiðlunum, og tað er jú fyri stóran part í miðlunum, at nýmótans politikkur verður rikin. Politisku floksapparatini eru ikki tað, tey vóru fyrr, og tað er í miðlunum, at dagsins politikarar fáa samband við verandi og nýggjar veljarar, sigur Per Højgaard, journalistur og samskiftisráðgevi.

### Konflikt er góð í miðlum

Hvat er tað, sum teir duga betur enn aðrir føroyskir politikarar í hesum samanhangi?

– Jenis á Rana og Torbjørn Jacobsen føra síni sjónarmið fram stutt og greitt, og tað er fyrsta treytin fyri effektivum samskifti. Í Løgtinginum til dømis skera teir báðir boðskapin til og spíska sjónarmiðini passaliga væl, so eru tey brúkilig í fjølmiðlasamanhangi, og tað hava føroyskir fjølmiðlar eftir øllum at døma tikið væl ímóti – annars høvdu teir neyvan fingið so nógva tíð og gott pláss í miðlunum.

– Harafturat eru Jenis á Rana og Torbjørn Jacobsen staddir á hvør sínum vongi í politikki, og báðir umboða sjónarmið, ið kunnu fatast sum víðgongd. Tá so er, er lætt at koma í konflikt við onnur sjónarmið. Konfliktin er í sjálvum sær eitt journalistiskt kriterium, og tað kann vera ein onnur orsøk til, at Jenis og Torbjørn hava góða atgongd til fjølmiðlarnar.

– So skulu vit eisini minnast til, at bæði Jenis á Rana og Torbjørn Jacobsen hava havt lættari atgongd til fjølmiðlar enn onnur. Jenis er rættiliga aktivur í Lindini og fær tann vegin samband við sínar kjarnuveljarar, og tað er ikki so langt síðani, at Torbjørn sum ein av stóru partaeigrunum í Fregnum hevði sín egna fjølmiðlapall til taks, sigur Per Højgaard.

### Týdning at meistra spælið

Hvat hevur tað at siga fyri ein politikara, at hann meistrar spælið í fjølmiðlunum og at sleppa fram at almenninginum?

– Tað hevur stóran týdning fyri politikarar at standa seg væl í fjølmiðlunum. Tað er í miðlunum, at fólk flest taka støðu til politikk og onnur samfelagsmál, og tann politikari, sum stendur seg illa har, kann fáa stutta politiska livitíð. Hetta hava vit fleiri dømi um í Føroyum.

– Ein fjølmiðlaserfrøðingur hevur pástaðið, at "synlighed er eksistens", og tað er helst ein sannleiki, tá vit tosa um politiska kommunikatión, sigur Per Højgaard.

Og sjónligur eru teir – Jenis av Rana og Torbjørn Jacobsen – stundum við hvøssum og avgjørdum sjónarmiðum, stundum í hørðum politiskum stríði, og sum tað nýggjasta í eini friðarligari og inniligari samtalu í kristiligum útvarpi.

## Shakin' Stevens setti lív í

**Fríggjakvøldið hevði Shakin' Stevens konsert í Tivoli í Keypmannahavn, og har var lív í, tá ið sangarin við teimum nógvu kendu sangunum spældi fyri eini stórari mannfjøld**

SHAKY
*Stefan í Skorini*

**Keypmannahavn:** Tónleikurin hjá Shakin' Stevens hevur ein ella annan løgnan eginleika, sum ger at hann framvegis selur fløgur og dregur stórar skarar av fólki til sínar framførslur. Og soleiðis var eisini í Keypmannahavn hetta kvøldið, tí eini 20.000 fólk vóru og lurtaðu.

Shaky legði ikki so ógvusliga fyri, møguliga fyri at spara krútið til seinni í framførsluni. Men tá hann fyrst spældi Oh Julie við sanginum Marie, Marie beint í hølunum, kom brádliga lív í fjøldina. Hann hevði ein vælmannaðan tónleikabólk við sær á pallin, og tað gjørdi framførsluna livandi og góða.

Í blaðnum í morgin hava vit meira um konsertina hjá Shakin' Stevens í Keypmannahavn.



*Shakin' Stevens kann enn. Fríggjakvøldið spældi hann fyri 20.000 fólkum í Keypamannahavn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tríggir partar, ein fundur, og ongin viðmerking

**Felagið føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevði fund við landsstýrismannin við heilsumálum fríggjadagin, har tey vildu leggja nøkur sjónarmið fram, men ongin vil siga nakað um, hvat hendi henda fríggjadagin**

SJÚKRAHÚSVERKIÐ
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Hvørki Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við heilsumálum, Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri, ella Jana H. Dalsgaard, forkvinna fyri Felagið føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, vildu siga nakað um, hvat kom burturúr fundinum.



*Hans Pauli Strøm vil ikki siga, hvat málið snýr seg um*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri, sigur at talan var ikki um samráðingar, men at hann bara var við sum embætisfólk hjá landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin Hans Pauli Strøm sigur, at hetta er ikki eitt politiskt mál, men eitt mál sum leiðslan á sjúkrahúsinum má taka sær av. Poul Geert Hansen er ein av leiðarunum á sjúkrahúsinum, nevniliga sjúkrahússtjóri, men á fundinum var hann bara embætisfólk hjá landsstýrismanninum.

### Siga onki um málið

Hvat hetta málið snýr seg um, tað vil ongin siga nakað um. Jana H. Dalsgaard, forkvinna fyri Felagið føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, hevði í gjár ikki tíð at gera viðmerkingar til málið áðrenn evstamark, tí hon sat á fundi. Á skrivstovuni hjá Felagnum føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar siga tey, at tey fáa onki sagt um málið.

### Vil ikki inn í málið

Men Hans Pauli Strøm sigur, at hann vil verða kunnaður um málið, men hann vil ikki fara inn í málið, tí so heldur hann seg seta leiðsluna á sjúkrahúsinum til viks.

Hans Pauli Strøm nýtti orðið "málið" um fundin við Felagið føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, men tað bar ikki til at fáa at vita, um "málið" snýr seg um eitt møguligt verkfall. Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri, sigur, at hann hevur onki hoyrt um nakað verkfall. Felagið føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar boðar frá, at fjølmiðlarnir skulu nokk fáa at vita, tá nakað nýtt frættist í "málinum."